# Vegghamar í Focus



Fríggjadagin 25. september frá kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Arnold Vegghamar upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Arnold Vegghamar er føddur í 1937. Hann er útbúgvin silvur- og gullsmiður og býr á Viðareiði.

Í Føroyum hevur Arnold Vegghamar m.a. havt stakframsýningar við málningum í Listaskálanum og verið við á Várframsýningum. Í Danmark hevur hann m.a. sýnt fram í Sønderborg, Hirtshals og í Galleri Sct. Gertrud í Keypmannahavn.

Arnold Vegghamar málar náttúruna har norðuri á Viðoynni, lendingin, bygdin, hamrar og urðar – tað eru ikki vanligar náttúrulýsingar, men heldur persónligar surrealistiskar tulkingar av landslagnum.

Framsýningin verður opin til 8. oktober, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



# Bygningssnikkarar

Fimm bygningssnikkarar hava staðið sveinaroyndina á Tekniska Skúlanum í Tórshavn í september 2009, teir eru f.v.: Jóhan Hansen, Kollafjørður, lært hjá Træsmiðjan GLT p/f, Jógvan Juul Poulsen, Strendur, lært hjá Snikkaravirkið v/J. Joensen, Anna Margreta Petersen, Vestmanna, lært hjá BSV p/f og Hartmann Hansen, Vágur, lært hjá Thormann Vang. Jegvan Daniel Feirup, Tórshavn, sum hevur lært hjá BSV p/f, vantar á myndini.

*Mynd: Atli Poulsen*

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Framkomnar lásaskipanir



*Framkomnar lásaskipanir verða sýndar frá á Hotel Hafnia. Bygningssnikkaravirkið BSV og Carl F international skipaðu fyri framsýningini. Her er tað Thomas Overgaard frá Carl F international, sum hevur eina framløgu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin 3. september var ein framsýning við nýggjastu og mest framkomnu lásaskipanum á Hotel Hafnia. Tað var føroyska fyritøkan Bygningssnikkaravirkið BSV í samstarvi við Carl F international sum skipaði fyri framsýningini.

Ymisk sløg av lásaskipanum vórðu sýnd fram sum t.d. "EVVA EPS", sum er ein framkomin mekanisk lásaskipan, har BSV lætt kann umleggja sylindarar, um lykilin blívur burtur.

"Salto Wireless" er ein nýggjheit til elektronisk atkomueftirlitskipan, og tí kann BSV nú eisini bjóða fram eina tráðleysa loysn. d-line "Fit in seven seconds" er ein heimsnýggjheit. Talan er um fyrsta hurðagreb í heiminum, sum kann monterast heilt uttan amboð upp á bert 7 sekund.

Bygningssnikkaravirkið BSV er ein fyritøka, sum varð stovnað í 1973 undir navninum Snikkaravirkið í Stoffalág. Í 1980 varð flutti virkið í nýggjan bygning á Smyrilsvegi 4 og broytti navn til P/F Bygningssnikkaravirkið BSV. Vilhelm M. Johannesen var stjóri øll árini til 2007, tá Helgi Johannesen tók yvir sum stjóri.

